FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn tann 27. november 2025

Til Løgtingsins Vinnunevnd

Føroya Løgting

Viðv.:

LM-046/2025 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Flyting av fiskidøgum til árið eftir verður víðkað til eisini at fevna um bólk 5)

Eins og undirritaði boðaði frá til hoyringina tann 26. november 2025 um omanfyrinevnda mál, sendi eg Vinnunevndini ein stuttan samandrátt av mínum viðmerkingum.

Sum eg greiddi frá til hoyringina, mæli eg frá at samtykkja uppskotið um at broyta § 19, stk. 4 í sjófeingislógini, so bólkur 5 eisini verður fevndur av sonevndu buffaraskipanini, sum loyvir, at óbrúktir fiskidagar kunnu flytast til árið eftir.

Eg gangi útfrá, at Løgtingsins vinnunevnd vigar áhugamálini hjá fiskivinnuni á landi og sjógvi (minus nakrar aktørar í bólki 5 b), Havstovuni og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum høgt, og tískil eisini fer at mæla løgtinginum frá at samtykkja hetta uppskot.

Tað er eyðsæð, at tey, ið virka í fiskidagaskipanini eiga at hava fleksibilitet, so tey eins og í øðrum skipanum hava møguleika at flyta veiðirættindi tvørtur um ár. Heldur enn at javnseta bólk 5 við hinar bólkarnar, mæli eg tó til, at vit ístaðin eftirhyggja alla buffaraskipanina.

Í verandi skipan eru ikki ásettar avmarkingar fyri, hvussu nógvir óbrúktir dagar kunnu verða fluttir yvir um ár. Tá vit hava ár við vánaligum fiskiskapi, og harvið nógvum avlopsdøgum, er orsøkin helst, at stovnurin er illa fyri. Tí kann tað vera sera óheppið, at vit árið eftir leggja enn fleiri dagar afturat, og harvið seta stovnin undir enn størri trýst.

Ístaðin eiga vit at broyta skipanina til at tryggja ein ávísan fleksibilitet yvirum ár, men samstundis seta okkurt slag av avmarking inn eins og t.d. í gulllaksinum og uppsjóvarfiskiskapinum, har møguleiki er fyri at flyta kvotu um ár, men í mesta lagi eina nøgd, ið svarar til 10% av samlaðu kvotuni hjá skipinum.


Ein onnur orsøk til, at eg mæli frá at samtykkja hetta lógaruppskotið er, at vit hava skipað fiskidagarnar eftir einari umsitingarætlan, sum breið undirtøka er fyri bæði í vinnuni og politisku skipanini.

Tá t.d. Marine Stewardsship Council (MSC) og ratingfyritøkan Moody´s spyrja, hvussu vit umsita okkara fiskastovnar, er umsitingarætlanin ein týðandi orsøk til, at føroyska fiskiveiðiumsitingin verður mett at vera nøktandi.

Við at broyta skipanina í endanum av árinum fyri at fáa fleiri dagar inn, kann tað tulkast sum, at vit ikki virða okkara egnu umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa á landgrunninum. Fáa altjóða felagsskapir ta fatan, at vit ikki virða okkara egnu umsitingarætlan og fiskidagaskipan, so er skjótt, at okkara fiskivinna kemur undir óneyðugt trýst.

Vit mugu heldur ikki gloyma, at okkara toskastovnur er á einum hættisliga og søguliga lágum stigi.

Hendan myndin vísir gongdina í okkara toskastovni:



ICES tilmælið fyri tosk í 2023 og 2024 var, at ongin toskur átti at verið fiskaður á landgrunninum. Í ár var tilmæli 2.848 tons. Vit hava sostatt longu fiskað knøpp 9.000 tons ella uml. 315% meira enn ICES tilmælið.

Bólkur 5 er tann bólkurin, sum fiskar mest tosk, og bólkur 5 b er mest virkin, tá fiskur er at fáa nær landi.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Høga veiðitrýstið og álvarsliga støðan í toskastovninum átti í sjálvum sær at verið nóg góð grundgeving fyri ikki at koyra fleiri dagar inn í skipanina.

Við støði í umsitingarætlanini hava vit skorið dagatalið við 30% seinastu tvey árini, tí tað stendur so illa til við toskastovninum. Tí er tað ikki rætt fyrst at skerja dagatalið fyri síðani at koyra dagar inn aftur í skipanina, tí ein bólkur manglar dagar.

Fyrr í summar lá ein trolari í knappar 3 mánaðir, tí hann ongar dagar hevði eftir. Hesin fekk ongar dagar frá Løgtinginum. Aðrir bátar og skip koma helst eisini at liggja. Skulu vit so eisini fara at leggja fleiri dagar inn til aðrar bólkar, tá teir fara at mangla?

Umboð fyri fiskivinnuna á landi og á sjógvi, og sum eru umboðað í ráðførðslubólkinum fyri umsitingarætlanina mæla staðiliga frá, at fleiri dagar verða koyrdir inn í skipanina. Havstovan mælir staðiliga frá, og tað ger undirritaði eisini.

Tað er umráðandi fyri trúvirðið, bæði innanlanda og víðari út í heim, at vit virða tær avtalur og semjur, sum eru gjørdar. Politiska skipanin eigur at lurta og taka til eftirtektar boðskapin frá vinnuni og fiskifrøðini. Um vit ikki gera tað, er sakligari og virðiligari at avtaka allar avmarkingar í fiskidagaskipanini.

Útfrá omanfyri standandi, vil eg staðiliga heita á Løgtingsins Vinnunevnd um at mæla Løgtinginum frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Jóhan Christiansen

Landsstýrismaður